

*Eini 60 fólk møttu upp til visjónstorgið um Vælferð á Hafnia í gjár*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Vælferð hjá førleikatarnaðum

## Mál fyri vælferð hjá førleikatarnaðum

**Vælferðarskipanin skal forða sosialari avbyrging**
**Atkoma hjá rørslutarnaðum skal tryggjast**
**Bústaðarmøguleikar hjá førleikatarnaðum skulu tryggjast**
**Førleikatarnað skulu stuðlast, so at tey eru so virkin, sum til ber**
**Arbeiðs- og útbúgvingarmøguleikar hjá førleikatarnaðum skulu betrast, so at flest møguligt gerast fíggjarliga sjálvbjargin**
**Uppihaldspeningur skal koma betur til góðar hjá teimum, ið veruliga tørvar hann**
**Førleikatarnaðum eigur at verða tryggjað ein inntøka, sum kann hjálpa teimum at hava eitt gott og sjálvstøðugt lív - sama, hvussu arbeiðsførleiki teirra er**



**Atkoma hjá rørslutarnaðum skal tryggjast:** Við lóg skal tí verða ásett, at atkomuviðurskifti skulu vera fyri øll, og fyri ný- og umbyggingar skal lógin setast í gildi frá 2008. Fyri verandi bygningar verður ásett ein skiftistíð fram til 2015. Viðvíkjandi privatum bygningum og verkløgum, ið ikki eru ætlað almenninginum, eiga at verða gjørdar vegleiðingar fyri lívsgongdarbygging. Blind/sjónveik og deyv/tunghoyrd skulu ikki verða avskorin frá tøkniligu samskiftismenningini. Við hesum verður hugsað um eitt nú heimasíður, almenn tiltøk, miðlar og myndugleikar. Við fjølbroyttum bústaðarmarknaði eiga fólk við serligum tørvi at kunna velja sær bústað, ið hóskar teimum.

**Viðgerðartilboð:** Uppafturvenjing og viðlíkahaldsvenjing eiga at verða veittar øllum eftir tørvi, so at samfelagið arbeiðir fyri, at øll kunnu vera virkin. Fyribyrging og viðlíkahaldsvenjing skulu í fyrstu syftu vera í primersektorinum, og uppafturvenjing skal verða sundurlutað millum primera og sekundera sektorin.

**Endurbúgving og rúmligur arbeiðsmarknaður:** Partarnir á arbeiðsmarknaðinum skulu binda seg til at gera skipanir, ið gera arbeiðsmarknaðin rúmligan. Ein fortreyt fyri hesum er, at atkomuviðurskiftini eru í lagi á arbeiðsplássunum, og møguleiki eigur at vera at fáa stuðulsfólk við til arbeiðis, um tørvur er á tí.

**Førleikatarnað tryggjað inntøka**

Meginreglan er hon, at nakað av arbeiðsførleikanum er eftir, og hann eiga tey at menna og nýta, m.a. við endurbúgving og broyttum arbeiðsumstøðum, vardum størvum við lønarískoyti, løttum arbeiði og persónligum stuðli.

Lægsta fyritíðarpensjón skal strikast, so at bert tvey pensjónsstig eru eftir. Gift og ógift skulu javnsetast, eins og fyritíðarpensjónistar, ið fáa uppihald á stovni, skulu varðveita sína pensjón.

# Eldravælferð

## Mál fyri eldravælferð

**Pensjónsskipanin skal betrast, útbyggjast og útjavnast**
**Eldrabústaðir og eldrarøkt skulu samantvinnast betur, og tørvurin á eldrabúplássum skal verða nøktaður**

**Pensjónsskipanin skal betrast, útbyggjast og útjavnast:** Ein komandi pensjónsskipan skal byggja á tríggjar súlur: fólkapensjónina, samhaldsfasta og eina eftirlønaruppsparing eftir avtalu millum løntakarar og arbeiðsgevarar. Við fólkapensjónini og samhaldsfasta verður tryggjað ein rímilig minstapensjón, og eftirlønaruppsparingin verður síðan bygd omaná, so at hon tryggjar inntøkuna hjá løntakaranum, tá ið hann fer um pensjónsaldur.

Í 2015 skulu allar tríggjar pensjónssúlurnar geva eina upphædd, sum í minsta lagi svarar til 65% av lønarinntøkuni, tó ongantíð minni enn eina arbeiðsmannaløn. Hjá teimum, ið ikki hava eftirlønaruppsparing frá arbeiðsmarknaðinum, skal samlaða pensjónsupphæddin svara til í minsta lagi 65% av eini arbeiðsmannaløn. Umframt hetta verður arbeitt fram ímóti, at pensjónistar skulu varðveita fólkapensjónina, eisini eftir at flutt verður á ellis- og røktarheim.



**Eldrabústaðir og eldrarøkt skulu samantvinnast betur, og tørvurin á eldrabúplássum skal verða nøktaður:** Fram til ár 2010 skulu byggjast knappliga hálvtannaðhundrað røktarheims- og sambýlispláss, soleiðis at tørvurin á eldrabúplássum fyri alt landið verður nøktaður. Harumframt eiga neyðugar dagføringar av gomlu ellis- og røktarheimum at verða gjørdar.

**Uppvenjing og eftirviðgerð:** Munandi skal verða bøtt um tilboðini til uppvenjing og eftirviðgerð til heimabúgvandi pensjónistar – herímillum fysio- og ergoterapi.

**Heildarskipan av eldrarøktini:** Eldrarøktin verður skipað í samanhangandi tænastueindir, samansettar av heimatænastuni, eldrasambýlum og ellis- og røktarheimum. Hesar tænastueindirnar skulu koma í staðin fyri verandi sjálvognarstovanar og skulu verða skipaðar undir felags leiðslu. Hvør tænastueind skal hava eina upptøkunevnd.

# Fólkaheilsa og heilsuverk

## Mál fyri fólkaheilsu og heilsuverk

**Heilsan skal vera tilvitaður partur av lívshátti okkara, so at fólkaheilsan sum heild batnar**
**Ymsu partarnir av heilsuverkinum eiga at verða samskipaðir og eiga at samarbeiða betur**
**Apoteksverkið verður heilsufakligur vitanar- og framleiðsludepil fyri heilivág**
**Heildarpsykiatriin verður ment og útbygd til ymiskan tørv**

**Heilsugóður kostur:** Miðað verður eftir, at føroyingar eta heilsugóðan kost. Serliga skal dentur verða lagdur á børn í dagansing og á næmingar í fólkaskúlanum, umframt at bøtt skal verða um matumstøðurnar á skúlunum. Talið á føroyingum, ið viga ov nógv, skal minka munandi. Átøk viðvíkjandi sunnum kosti og kostvanum skulu gerast, eins og frukt og grønmeti skulu vera atkomulig og ódýr hjá øllum.

**Rørsla og likamsvirkni:** Talið á teimum, sum røra seg regluliga, skal økjast munandi. Skúlanæmingar skulu í 2015 hava ein skúlatíma í likamsvirkni dagliga. Í 2009 skal ein triðingur av øllum almennum arbeiðsplássum hava tikið stig til, at starvsfólkið hevur atgongd til kropsvenjing í arbeiðstíðini. Ein ítøkilig ætlan um súkklubreytir skal gerast, so til ber at súkkla trygt í Føroyum innan 2009. Harumframt eigur at verða skipað fyri einum rørsluári – nevnt "Føroyar í rørslu."




**Royking:** Øll hava rætt til at liva og virka í einum roykfríum umhvørvi. Í 2009 skal talið á roykjarum í minsta lagi vera 20% av fólkinum. Í 2015 skal tað í mesta lagi vera 10%. Talið á teimum, sum byrja at roykja, skal minka munandi. Tilboð um roykiavvenjing skal bjóðast øllum, sum vilja gevast at roykja. Miðast skal eftir, at eingin, ið er føddur í 2000 ella seinni, fer at royka. Í 2008 skal eingin roykja á almennum støðum.

**Rúsdrekka- og rúsevnismisnýtsla:** Málini eru, at rúsdrekkamisnýtslan sum heild skal minka, og ung skulu fara seinni at nýta rúsdrekka, enn nú. Føroyar skulu somuleiðis verða rúsevnafríar.

**Heildarpsykiatriin verður ment og útbygd til ymiskan tørv:** Orsakað av ov fáum bústaðartilboðum hava fólk verið noydd at ligið á sjúkrahúsinum, hóast tey hava verið liðugt viðgjørd. Høvuðspartarnir í heildarpsykiatriini verða samskipaðir og útbygdir hvør sær við nøktandi tilboðum. Verandi psykiatrilóg er frá 1938, og tí skal gerast nýggj lóg, sum skal styrkja rættartrygdina hjá sálarsjúkum.

**Psykiatriski depilin skal umvælast og dagførast:** Barna- og ungdómspsykiatriin eigur at útbyggjast frá eini konsulentskipan til eina deild á psykiatriska deplinum, og setast skal eisini á stovn ein flytfør, ambulant gerontopsykiatrisk tænasta (sjúkugreining og viðgerð av eldri fólki við psykiatriskum sjúkum).